# HØVUÐSAVTALA

# MILLUM

# FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

# OG

# BÚSKAPAR- OG LØGFRØÐINGAFELAG FØROYA

## Øki

§ 1. Henda høvuðsavtalan geldur fyri

1) Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya (felagið),

2) limirnar í hesum felagi, ið eru ikki tænastumenn, og

3) Fíggjarmálaráðið (arbeiðsgevaran), við teimum stovnum, sum ein felags sáttmáli, ið Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya hava gjørt, fatar um.

## Samstarv og frælsi at skipa seg í feløg

**§ 2.** Partarnir eru á einum máli um at fremja gott samstarv.

**§ 3.** Fíggjarmálaráðið viðurkennir, at tað stendur starvsfólkunum frítt at vera limir í Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og at vera virkin í arbeiði felagsins eftir galdandi reglum í sáttmálum og avtalum partanna millum.

*Stk. 2.* Fíggjarmálaráðið bindur seg til ikki at gera sáttmálar við onnur fakfeløg, um størv, har galdandi felagssáttmáli er við Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

## Skipanarrættur

**§ 4.** Rættindini hjá arbeiðsgevaranum at skipa og býta arbeiðið skal verða framt eftir sakligum stevnumiðum - eisini við neyðugum fyriliti fyri áhugamálum starvsfólkanna - og annars at halda galdandi lógir og teir sáttmálar, ið partarnir hava gjørt sínámillum.

## At gera sáttmála

**§ 5.** Partarnir eru samdir um, at lønar- og onnur setanarviðurskifti eiga at verða ásett í felags sáttmálum partanna millum.

**§ 6.** Tá ein sáttmáli um lønar- og setanarviðurskifti er uppsagdur heilt ella lutvíst, skulu vera samráðingar um nýggjan sáttmála skjótast tilber, og ikki seinni enn ein mánað eftir, at áheitan er send um hetta.

Samráðingar um nýggjan sáttmála fyri tann, sum er uppsagdur, skulu verða lagdar soleiðis til rættis, at nýggjur sáttmáli verður gjørdur, áðrenn tann uppsagdi sáttmálin fer úr gildi.

*Stk. 2.* Er semja ikki fingin í lag um nýggjan sáttmála tann dag, sáttmálin fer úr gildi, skulu ásetingarnar í sáttmálanum, sum fór úr gildi, framvegis verða fylgdar, til nýggjur sáttmáli er samtyktur og settur í gildi, ella arbeiðssteðgur er settur í verk sambært ásetingunum í § 9.

**§ 7.** Geva samráðingarnar um nýggjan sáttmála einki úrslit, eru partarnir samdir um, at spurningurin skal verða viðgjørdur eftir reglunum hjá "Semingsstovninum", sb. lóg nr. 86 frá 31. mars 1928 við seinni broytingum. Partarnir vátta, at teir ætla at halda reglurnar í hesari lóg.

**Friðarskylda**

**§ 8.** Meðan sáttmálin er í gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða settur í verk. Arbeiðssteðgur er verkbann, verkfall, blokada og boykott og eisini skipað avfólkan á stovnunum ella pørtum á stovnunum.

*Stk.2.* Hóast ein sáttmáli er uppsagdur og farin úr gildi, hava partarnir skyldu at halda hann, til nýggjur sáttmáli er gjørdur, ella arbeiðssteðgur er settur í verk eftir ásetingunum í § 9.

**Arbeiðssteðgur**

**§ 9.** Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya viðurkenna rættin hjá hvør øðrum at skipa arbeiðssteðg sambært ásetingunum í stk. 2 til 4.

*Stk. 2.* Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal vera skrivlig og send við innskrivaðum brævi og latin mótpartinum minst ein mánað undan arbeiðssteðginum.

*Stk. 3.* Fráboðanin, sum nevnd er í stk. 2, skal greiða frá, hvønn arbeiðssteðg talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

*Stk. 4.* Arbeiðssteðgur kann bara verða settur í verk frá 1. í einum mánaði.

*Stk. 5.* Tá ið ósemjan er av, fer hvørt starvsfólkið til arbeiðis aftur, har tað starvaðist beint undan ósemjuni, og tað áliggur báðum pørtum at gera sítt til at fáa vanlig og friðarlig arbeiðsviðurskifti aftur.

**§ 10.** Arbeiðssteðgur fatar ikki um

- limir Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya í leiðarastørvum.
- limir, um arbeiði teirra er neyðugt fyri at gera samráðingarnar lidnar og steðga ósemjuni ella
- limir, sum eftir avtalu partanna millum ikki skulu fara í arbeiðsteðg.

**Seming og gerðarrættur**

**§ 11.** Ósemja partanna millum, av tí at annar parturin setur krav um lønar- og setanarviðurskifti, og hin parturin ikki viðkennir kravið, ella tí at annar parturin heldur, at felags sáttmáli er brotin, eigur at enda við seming, ella í øðrum lagi við gerðarrætti eftir reglunum niðanfyri.

*Stk. 2.* Tá ið annar parturin biður um seming, skal semingsfundur verða hildin partanna millum. Er ikki annað avtalað, skal semingsfundur verða innan 5 dagar, roknað frá tí áheitanin er komin.

*Stk. 3.* Arbeiðssteðgur skal verða fráboðaður pørtunum beinanvegin. Semingsfundur skal verða hildin í seinasta lagi dagin eftir, at arbeiðssteðgurin er byrjaður, um ikki arbeiðssteðgurin er av, áðrenn semingsfundur er hildin.

*Stk. 4.* Fundarfrásøgn verður skrivað á semingsfundinum, og báðir partar skulu skriva undir frásøgnina.

*Stk. 5.* Heldur annar parturin seg undan at fáa endað ósemju innan tær í stk. 2 og 3 nevndu freistir, verður hetta roknað sum brot á hesa høvuðsavtalu. Í tílíkum førum hevur hin parturin rætt til at vísa málið til gerðarrætt uttan semingsfund.

*Stk. 6.* Er semingsroyndin úrslitaleys, og hon snýr seg um, hvussu felags sáttmálin skal verða tulkaður ella um brot á felags sáttmálan, kann annar parturin vísa málið til endaliga avgerð í gerðarrætti.

*Stk. 7.* Í gerðarrættinum eru 3 limir. Hvør parturin velur ein, og velja teir ein ástøðumann í felag. Partarnir kunnu avtala, at í gerðarrættinum skulu vera 5 limir.

*Stk. 8.* Fæst ikki semja um hvør skal verða ástøðumaður, velur sorinskrivarin ástøðumannin.

*Stk. 9.* Samstundis sum málið verður víst til gerðarrætt, skal parturin senda kærurit, og boða frá nøvnunum á teimum valdu gerðarrættarlimunum. Mótparturin skal, er annað ikki avtalað, velja sínar limir innan 7 dagar, roknað frá tí at fráboðanin, um at málið er víst til gerðarrætt, er komin. Snýr málið seg um ein arbeiðssteðgur ella verkbann er ímóti sáttmálanum, skulu partarnir velja sínar limir inna 3 dagar.

Ástøðumaðurin ger av, hvussu langa freist mótparturin hevur at senda inn svarrit og um replikkur og duplikkur kunnu verða latnir inn og tíðarfreiðst fyri tí.

*Stk.10.* Verður farið út um eina av hesum nevndu freistum, kann ástøðumaðurin gera av, at gerðarrætturin vísir málið frá sær.

*Stk.11.* Tá ið serlig viðurskifti eru, kann verða avtalað at fara út um hesar nevndu freistir og reglur.

*Stk. 12.* Um málið bæði snýr seg um, um ein arbeiðssteðgur er ímóti sáttmálanum, og um at áleggja at rinda eina samsýning, kann gerðarrætturin, um tað at áleggja at rinda eina samsýning krevur størri kanningar, í fyribilsúrsskurði taka støðu til fyrra spurningin.

*Stk. 13.* Er í atkvøðugreiðsluni ikki meiriluti fyri eini avgerð í málinum, skal ástøðumaðurin gera av ósemjuna í einum grundgivnum úrskurði, har um neyðugt, spurningurin um førleikan hjá rættinum verður avgjørdur.

*Stk. 14.* Ástøðumaðurin kann í sínum úrskurði einans taka avgerð, ið er innan fyri atkvøðugreiðsluna hjá hinum gerðarrættarlimunum og annars innan fyri framkomnu málskrøvini og málsevnini.

**§ 12.** Gerðarrætturin kann áleggja tí, ið hevur, ella teimum, ið hava verið við í sáttmálastríðnum, at rinda eina samsýning, sum skal verða ognað klagaranum. Snýr sáttmálabrotið seg um ikki at hava goldið eina skylduga peningaupphædd, kann úrskurðurin, í staðin fyri at rinda samsýning, verða at rinda hesa peningaupphædd. Er annað ikki avtalað frammanundan, kann sjálvum felagnum bara verða álagt rættarlig ábyrgd, hevur tað verið virkið í málinum.

*Stk.2.* Samsýningin verður ásett við fyriliti í øllum viðurskiftum í málinum og við hóskandi fyriliti fyri, hvussu sáttmálabrotið hevur verið fyrigeviligt. Tá mett verður um arbeiðssteðg, sum er í ímóti sáttmálanum, skal fyrilit verða tikið fyri, um tað frá mótpartinum eru viðurskifti av slíkum slag, at arbeiðssteðgurin verður hildin at vera rímiligur atburður. Samsýningin kann annars fella heilt burtur, um linnandi umstøður eru, og skal fella burtur, um atburður móti sáttmálanum frá mótpartinum verður hildin at geva rímiliga orsøk til arbeiðssteðgin. Samsýningar fella burtur, verður tað prógvað, at arbeiðssteðgurin er elvdur av trivnaðarorsøkum, sum mótparturin hevur ábyrgdina av. Samsýning kann ikki verða áløgd teimum fólkum í einum arbeiðssteðgi, sum hava tikið upp aftur arbeiðið, áðrenn semingsfundir hevur verið, ella hava fylgt einum tilmæli frá hesum fundi um beinanvegin at fara aftur til arbeiðis, uttan tað verður prógvað, at eingin rímilig orsøk er til arbeiðssteðgin, ella arbeiðssteðgurin verður hildin at vera liður í eini skipaðari atgerð.

**§ 13.** Ósemjur um tulking ella brot á hesa høvuðsavtalu verða viðgjørd eftir ásetingunum í §§ 11 og 12.

**Gildiskoma og uppsøgn**

**§ 14.** Henda høvuðsavtala kemur í gildi 1. oktober 2003, og stendur við, til annar parturin við 6 mánaða fráboðan sigur hana upp, tá ein oktober mánaði endar, tó í fyrsta lagi 31. oktober 2006.

*Stk. 2.* Tann parturin, sum vil hava broytingar í høvuðsavtaluni, skal 6 mánaðir undan uppsøgnini boða hinum partinum frá. Samráðingar um nýggja høvuðsavtalu fyri hana, sum er uppsøgd, skulu verða lagdar soleiðis til rættis, at nýggj høvuðsavtala verður gjørd, áðrenn tann uppsagda fer úr gildi.

*Stk. 3.* Hava samráðingar um at endurnýggja høvuðsavtaluna, eftir at hon er uppsøgd, ikki borið í sær, at nýggj høvuðsavtala er komin í gildi 31. oktober, geldur høvuðsavtalan, sjálvt um komið er út um dagin, tá ið hon skuldi farið úr gildi, til nýggir felags sáttmálar eru settir í

gildi fyri tann gamla, og høvuðsavtalan fer úr gildi, tá ið nýggju felags sáttmálarnir eru komnir í gildi.

*Stk. 4.* Koma partarnir á arbeiðsmarknaðinum ásamt um víðkaðan gerðarrætt, skulu sáttmálapartarnir samráðast um §§ 11 og 12. Hesar samráðingar koma ikki undir tíðarásetingarnar í stk. 1 og 2.

*Á Argjum tann 24. november 2003*

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya

Fíggjarmálaráðið